

Havila Subsea er lagt fyri teym. Mynd: Havila Shipping

# Havila Shipping leggur enn eitt skip og sendir 50 fólk heim

**Jógvan Hugo Gardar**

29.12.2015 - 21:01

Oljan.fo

Norska reiðaríið Havila Shipping, ið er gott kent millum føroysk sjófólk innan fralandsvinnuna, hevur lagt sítt triðja skip, orsaka av oljukreppuni.

Í samrøðu við Nett.no sigur stjórin í Havila Shipping, Njål Sævik, at á nýggjárinum endar avtalan sum skipið Havila Subsea hevur, og eingin nýggj avtala er uppá pláss.

- Tí velja vit at leggja skipið, sigur Sævik. Havila Subsea er nýtt skip, ið Havila Shipping fekk frá skipasmiðjuni í 2011. Síðani ta hevur skipið havt uppgávur fyri Subsea 7 í norskum og bretskum sjógvi. Subsea 7 kundi leingja avtaluna í eitt ár, men hevur valt ikki at gera tað, skrivar Nett.no. Hetta merkir at 50 starvsfólk verða send heim, tí einki er at gera hjá teimum.

Frammanundan hevur Havila Shipping lagt skipini Havila Mars og Havila Neptun.

Feskastu tølini vísa at tað nú eru 97 norsk frálandsskip sum liggja fyri teym. Maritime.com hevur ein lista sum vísir hvørji skip sum eru løgd fyri tey. Listin sæst her